FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

Kommunufelagið

# Samstarvsavtala millum
# Fróðskaparsetur Føroya & Kommunufelagið

# SetursKom 1.0

*Virkandi, varandi vitan*

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

Kommunufelagið

## 1. Endamál

Endamálið við avtaluni[1] **SetursKom 1.0** er at menna og skipa granskingarsamstarvið millum Fróðskaparsetur Føroya (FF) og Kommunufelagið (KF) við støði í endamáli Kommunufelagsins og strategiætlan Setursins.

Harafturat er endamálið við **SetursKom 1.0 at** formalisera samstarvið millum FF og KF við høvuðsdenti á at menna verkætlanir innan fyri gransking og nýmenning, sum báðir partar hava áhuga í og fáa ágóðan av.

Avtalan skal harafturat leggja lunnar undir eitt framhaldandi burðardygt samstarv millum FF og KF.

## 2. Grundarlag

Kommunurnar í Føroyum gerast alsamt meira týðandi partur av føroyska vælferðarsamfelagnum. Samstundis er vælferðarsamfelagið og harvið føroysku kommunurnar undir stórum trýsti av stóru demografisku broytingunum, sum liggja fyri framman.

Kommunurnar standa fyri samfelagsligum avbjóðingum, sum krevja nýhugsan.

Tískil er tað meira umráðandi enn nakrantíð, at FF og kommunurnar finna saman um at skapa varandi fakliga vitan, sum stimbrar undir tær broytingar, ið skulu til fyri at tryggja komandi ættarliðnum eitt framkomið og vælvirkandi vælferðarsamfelag.

FF er fremsti vitanardepil landsins, hvørs missión er at veita dygdargóða og eyðkenda undirvísing og læring grundað á gransking á høgum altjóða stigi. Missiónin hjá FF, tá tað ræður um gransking, er m.a. at:

- Fremja dygdargóða gransking, ið serliga er viðkomandi fyri samfelagsliga, búskaparliga, mentanarliga, løgfrøðiliga og umhvørvisliga tørvin í Føroyum.
- Veita almannagagnliga tænastu, ið føroyska samfelagnum tørvar, við m.a. áhaldandi gransking og virka fyri burðardyggari búskaparligari, samfelagsligari og mentanarliga menning.

---

[1] Heimilað í Løgtingslóg nr. 58 um Fróðskaparsetur Føroya, §20, stk 2.

## 3. Samstarvið

Við gransking skal samstarvið skapa nýggja varandi vitan, ið virkar fyri at betra um og menna tær tænastur, ið kommunurnar veita.

Samstarvið skal í mest møguligan mun fevna um allar fakbólkar á FF og tær kommunur, ið hava áhuga at vera við í einstøku verkætlanunum.

Úrslitini frá samstarvinum skulu leggjast fram og/ella verða atkomulig hjá øllum kommunalum áhugapørtum.

## 4. Fígging

Verkætlanirnar kunnu gerast í samstarvi millum FF og KF ella millum FF og eina ella fleiri kommunur ella kommunal samstørv. Haraftrat kunnu aðrir áhugapartar uttan fyri kommunala geiran vera við í verkætlanunum.

Hvør verkætlan skal vera fult fíggjað, áðrenn verkætlanin kann setast í gongd. Somuleiðis skal avtala um fígging av einstøku verkætlanunum undirskrivast av báðum pørtum, áðrenn verkætlanin fer í gongd.

## 5. Skipan

Granskingar- og framtakseindin á FF og umboð fyri KF hava yvirskipaðu ábyrgdina av samstarvinum.

Einaferð um árið hittast umboð fyri FF og KF at meta um samstarvið og gongdina í einstøku verkætlanunum, og FF hevur eftir umbøn frá KF ábyrgd av at skriva ársfrágreiðing um samstarvið.

Á árligum verkstovum, ið KF tekur stig til og samskipar, verða verkætlanir umrøddar, orðaðar og raðfestar.

Granskingarleiðarar á viðkomandi deildum á FF hava yvirskipaðu ábyrgdina av einstøku granskingarverkætlanunum, og viðkomandi granskingarleiðarar hava eisini ábyrgd av at seta saman toymi, ið eru skikkað til verkætlanirnar.

Granskingartoymið á FF orðar verkætlanarlýsing og skipar, um neyðugt, arbeiðið við at fáa neyðugu fígging til vega.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

Kommunufelagið

KF útnevnir umboð, ið er nærmasti samstarvsfelagi hjá granskingarleiðara á einstøku verkætlanunum.

## 6. Dáta

FF er ánari av dátum og hevur skyldu at tryggja, at dátur verða goymdar og handfarnar sambært galdandi lóggávu á økinum

## 7. Tagnarskylda og víðarilating av upplýsingum

Víst verður til galdandi lóggávu á økinum.

## 8. Tíðarskeið og uppsøgn

Avtalan er galdandi frá 01.11.2023 til 31.10.2028.

Partarnir kunnu hvør sær siga avtaluna upp við seks mánaðar freist, tó at avtalur í sambandi við verkætlanir eru galdandi, til verkætlanin endar.

## 9. Undirskrift

Tvey eintøk, eitt til hvønn partin, av avtaluni verða undirskrivað av umboðum fyri FF og KF.

Vegna Kommunufelagið

Dato: 25.10.23

*Tórbjørn Jacobsen, formaður*

Vegna Fróðskaparsetur Føroya

Dato: 25.10.23

*Magni Mohr, pro-rektari fyri gransking*